Nýggjur fiskiveiðisáttmáli:




*Beint eftir nýggjár komu hesi bæði norsku línuskipini á Havnina at bíða eftir nýggju fiskiveiðiavtaluni millum Noreg og Føroyar. Í Fiskimálaráðnum siga tey, at fýra norsk línuskip nú eru undir Føroyum. Kvotan hjá teimum er minkað eitt lítið vet í mun til seinasta ár*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Seravtalur um atgongd at fiska makrel og svartkjaft

**Føroyar og Noreg hava nú undirskrivað sínámillum fiskiveiðiavtalu fyri 2006, og seravtalur um atgongd eru gjørdar um makrel-og svartkjaftaveiði hjá hvørjum øðrum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Umsíðir spurdist semja burtur úr samráðingunum um sínámillum fiskiveiðiavtalu millum Føroyar og Noreg á fundinum í Keypmannahavn í farnu viku. Hesar samráðingar vóru annað umfar millum londini bæði fyri at fáa avtaluna fyri 2006 undir land.

Eftir samráðingar í Keypmannahavn í 2-3 dagar, gjørdist úrslitið, at partarnir kundu undirskriva nýggjan fiskiveiðisáttmála millum londini.

Føroyar og Noreg hava síðani 1977 havt eina sínámillum avtalu um fiskiveiði, sum hevur til endamáls at tryggja og menna eitt breitt og fjølbroytt fiskiveiðisamstarv landanna millum.

### Makrelur

Í Fiskimálaráðnum verður sagt, at ein tann største broytingin í avtaluni fyri 2006 er, at gjaldið fyri atgongd hjá føroyingum at fiska sína makrelkvotu í norskum sjógvi ikki longur er ein partur av avtaluni.

- Í fleiri ár hava Føroyar verið noyddar at gjalda fyri atgongd at fiska sín part av makreli í norskum sjógvi. Men nú hava londini bæði gjørt eina seravtalu um atgongd at fiska ávísar partar av sínari strandalandskvotu av makreli hvør hjá øðrum. Fyri at varðveita javnvágina í avtaluni, nú gjaldið fyri atgongd ikki longur er eitt element í avtaluni, hava Føroyar fingið 2.743 tons av makreli aftrat, sum fyrr varð latið Noregi.

Fiskimálaráið sigur, at Føroyar nú kunnu fiska tilsamans 3% av heildarkvotuni fyri makrel í norskum sjógvi. Í 2006 svarar hetta til 13.260 tons samanborið við tey umleið 8.500 tonsini av makreli, sum vit kundu fiska í norskum sjógvi í 2005. Noreg fær atgongd til at fiska 1,5% av heildarkvotuni í føroyskum øki, og hetta svarar til 6.630 tons í 2006.

### Svartkjaftur

Ósemjan um kravið hjá Noregi at fáa atgongd til at fiska sín part av strandalandskvotuni av svartkjafti í føroyskum øki, setti sín dám á samráðingarnar um fiskiveiðiavtaluna hesaferð. Hetta var eisini høvuðsorsøkin til, at eingin semja fekst á fundinum í Oslo í desember.

- Men eins og við makrelinum, eru Føroyar og Noreg nú eisini samd um eina seravtalu um atgongd at fiska svartkjaft hjá hvørjum øðrum. Noreg fær høvi at fiska 4% av strandalandskvotuni av svartkjafti í føroyskum sjógvi, tó í mesta lagi 60.000 tons, og Føroyar fáa atgongd at fiska 2% av strandalandskvotuni í norskum øki, ella í mesta lagi 30.000 tons. Sum avleiðing av seravtaluni fer svartkjaftakvotan, sum Føroyar hava havt í norskum sjógvi, úr 16.800 tonsum niður í 2.000 tons, og norska svartkjaftakvotan í føroyskum sjógvi fer úr 36.200 tonsum niður í 20.800 túsund tons.

### Botnfiskur

Samlaða botnfiskakvotan í norskum sjógvi komandi ár er í høvuðsheitum óbroytt í mun til 2005.

- Toskakvotan í Barentshavinum verður varðveitt á sama støði, hóast heildarkvotan er minkað nakað, og kvotan á hýsu fer upp við 270 tonsum, sigur Fiskimálaráðið.



*Makrelurin hevur stóran týdning fyri føroysku nótaskipini*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Noreg fær heldur minni av botnfiski

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í tíðindaskrivinum, sum Fiskimálaráðið hevur sent út eftir fiskiveiðisamráðingarnar við Noreg, stendur einki um norsku botnfiskakvotuna undir Føroyum, sum felagið Línuskip ynskir, har piparið grør.

### Av misgávum

Andrass Kristiansen, samráðingarleiðari, ásannar, at hesin parturin av misgávum ikki er við í tíðindaskrivinum.

Hann sigur, at norska botnfiskakvotan undir Føroyum er minkað eitt lítið vet í mun til kvotuna seinasta ár.

Noreg hevði loyvi at fiska tilsamans 5.410 tons í fjør, men í ár er talið 5.267 tons.

- Hetta er sostatt ein lítil minking í norsku botnfiskakvotuni undir Føroyum, staðfestir samráðingarleiðarin.

### Longa og brosma

Andrass sigur, at tað, sum norðmenn í fyrsta lagi hava loyvi at fiska undir Føroyum, er longa og brosma.

- Í fjør kundu norsk skip eisini fiska eina minni nøgd av svartkalva og havtasku, men hesi fiskasløgini eru tikin burtur úr avtaluni í ár, sigur hann.

12 norskir línubátar kunnu fiska á djúpum vatni undir Føroyum í senn, og sambært Fiskimálaráðnum, eru fýra bátar komnir higar at royna, nú fiskiveiðiavtalan millum londini bæði er komin upp á pláss.

### Trupult í Oslo

Samráðingarnar millum londini vóru á embætismannastigi, har samráðingarfólkini høvdu fingið nakrar heimildir frá myndugleikunum at samráðast út frá.

Andrass Kristiansen sigur, at samráðingarnar í Oslo í desember vóru strævnar, men betur gekst, nú partarnir hittust aftur í Keypmannahavn.